# Leysir hundar afturvendandi trupulleiki

**At hundar ganga leysir, vísir seg at vera ein afturvendandi trupulleiki fleiri staðni í landinum. Tað letur eisini til, at tað í fleiri førum, eru teir somu hundarnir, sum ganga aftur. Ein lóg er, sum hundafangarar kring landið hava at ganga eftir, men ikki altíð er tað so lætt at fanga hundarnar**

LEYSIR HUNDAR
*Solby A. Eliasen*


*Leysir hundar eru til miklan ampa fyri nógv fólk*

**Klaksvík:** Nógvir hundar ganga leysir, og tað er til miklan ampa fyri nógv fólk.

Andrass Joensen, hundafangari í Klaksvík, sigur, at leysir hundar eru ein stórur trupulleiki í kommununi. Hann sigur eisini, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki, sum tykist at vera sera torførur at loysa.

– Nógv fólk eru bangin fyri hundum, og kanska serliga eisini bangin fyri, at hundarnir skulu gera seg inn á eitt nú børn, tí vit vita jú øll, at børn vilja fegin kela fyri hundunum, sum tey síggja, greiðir Andrass frá.

– Onkuntíð boða fólk sjálvi frá, at ein hundur gongur leysur. Og onkuntíð hava fólk simpulten tikið hundin sjálvi og bundið hann, og so ringja tey til mín, sigur Andrass, sum ikki dylir fyri, at hann heldur, at summi fólk, sum kanska eru vorðin troytt av teirra hundi, gera sær dælt av, at teir verða avlívaðir, um teir ikki verða avheintaðir.

– Men tað er ikki altíð, at eg fangi teir. Eru tað teir somu hundarnir, so kenna teir meg aftur, tá teir síggja meg, og so renna teir undan.

Tá ein hundur er tikin, verður hann koyrdur inn í eitt hús, sum kommunan hevur til tað sama. Har verður hundurin so passaður inntil eigarin kemur eftir honum. Men tað er ikki ókeypis. Fyri tað fyrsta, skal eigarin rinda eitt upptøkugjald, sum er 300 krónur, og so fær hann eisini eina bót fyri at hava brotið hundalógina. Um hundurin stendur inni meira enn eitt samdøgur verða 125 krónur eyka um døgnið lagdar afturat. Og verður hundurin ikki avheintaður innan trð samdøgur, so verður hann avlívaður. Henda mannagongdin verður nðtt allastaðni í landinum, tá ein leysur hundur verður tikin.

## Tá tíkir ganga á illum...

Andrass vísir eisini á, at tá tíkir ganga á illum, er tað serliga ringt. Tá royna tey, sum eiga tíkina kanska at halda hana innandura, men allir hannarnir, sum ganga leysir tevja seg fram til tíkina og ganga so og gnaga bæði úthurðar og alt annað kring húsið, sum teir kunnu fáa fatur á.

– Tá er tað so ikki tey, ið eiga tíkina, sum hava feilin, men hundaeigarar, sum loyva hundunum leysar út, sigur Andrass, sum veit at siga um nøkur fólk, sum áttu eina tík, ið gekk á illum.

– Tá kom ein hundur har, og hann gjørdi so nógvar ónáðir, at fólkini tóku hann inn og koyrdi hann inn á WC -ið í kjallaranum, og so ringdu tey eftir mær. Tá eg so kom, og vit fóru inn eftir hundinum, ja...tá skuldi tú sæð WC-ið. Hundurin hevði so raserað tað til. Tað sá ræðuligt út inni har, greiðir Andrass frá.

Andrass er blivin bitin tvær ferðir av hundum, sum hann hevur tikið, men tað hevur tó ikki verið nakað álvarsligt. Hann veit heldur ikki um nakra hending, har hundur hevur lagt á nakran og nakað álvarsamt er hent, tíbetur.

Men hann sigur seg eisini stúra meira fyri hesum stóru hundunum, sum verða innfluttir.

tí um ein tílíkur hundur leggur á eitt barn, so er ikki lukkuligt.

Andrass heitir so staðiliga á hundaeigarar, um ikki at loyva hundunum út einsamallir, tí tað er ikki loyvt at hundar ganga leysir, og tað er eisini til miklan ampa fyri fólk.

## Fólk líkaglað

Frá politistøðini í Runavík fættir Sosialurin, at leysir hundar eru eisini ein trupulleiki í Eysturoynni. Har er ein hundafangari, sum er í Fuglafirði, Gøtu, Leirvík og úti á Skálafirðinum, men tað er tað sama sum í Klaksvík. Tað er torført at fanga allar hundarnar, sum ganga leysir. Serliga tá, tað eru teir somu, sum ganga aftur.

– Fólk eru líka glað. Tey leggja ikki serliga nógv í hundarnar hjá sær, tá teir bara ganga soleiðis fyri vág og vind, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.

Vakthavandi sigur eisini, at tað hava verið onkrir trupulleikar av leysgangandi hundum nú undir lembingini, og so hava hundarnir eisini gjørt seg inn á gæs.

Frá løgregluni í Tórshavn fættir Sosialurin, at trupulleikin eisini er stórur har.

Vakthavandi sigur, at løgreglan fær javnan fráboðanir frá fólki um, at hundar eru leysir. Serliga ofta gera fólk vart við, at hundarnir renna eftir børnum, og so verða fólk sjálvandi upp aftur meiri ørkymlað og bangin fyri hesum hundunum.

Ikki hevur tað tó verið so nógv av at hundar gera seg inn á eitt nú havar og tílíkt. Tá er tað mest seyður, sum kanska er sloppin úr onkrari trøð onkunstaðni, sum ger ónáðir. Men hóast tað kann verða dørt at fáa hundin leysan aftur, aftan á at hann er tikin upp, so letur tað ikki til, at nakar bati er at hóma í málinum.

Tórshavnar Kommuna hevur ein aktingarmann, sum hevur til uppgávu at taka sær av øllum slíkum, sum hevur við leysgangandi djór at gera. Eisini skal aktingarmaðurin taka sær av trupulleikum, sum til dømis rottur.

Vakthavandi sigur at enda, at í Nólsoy er trupulleikin við leysum hundum sera stórur. Løgreglan hevur verið úti í Nólsoy, men tað gongur bert stutt tíð, so er søgan tann sama aftur.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

**Mia Skarðhamar**

doyði og varð jarðað.

*Familjunnar vegna*
**Helen og Johan**



# Miðar eftir at savna tingið um almannamál

**– Almannamál hava í flestu førum ógvuliga stóran týdning fyri nógv fólk, men kunnu verða partapolitiskt trupult at fremja, og tá er gott, at um breið semja er í tinginum. Andstøðan hevur longu gjørt vart við, at hon tekur undir við stórum parti av tí, sum stendur í samgonguskjalinum, so tað boðar frá góðum, sigur nýggi landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu**

POLITIKKUR
*Turið Kjølbro*


*– Politikkur er altíð ein spurningur um at royna at vaksa í tí lendi, sum er møguligt, sigur Páll á Reynatúgvu*

– Kjølurin í mínum arbeiði sum landsstýrismaður í almannamálum verður samgonguskjalið, sigur Páll á Reynatúgvu, ið eftir fýra ár sum løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin, nú tekur við sum landsstýrismaður.

Orðingarnar, sum verða brúktar í samgonguskjalinum, eru savnandi, heldur nýggi landsstýrismaðurin.

– So langt tað ber til, fari eg at byggja brúgv ímillum samgongu og andstøðu. Andstøðan hevur longu gjørt vart við, at hon tekur undir við stórum parti av tí, sum stendur í samgonguskjalinum, so tað boðar frá góðum. Almannamál hava í flestu førum ógvuliga stóran týdning fyri nógv fólk, men kunnu verða partapolitiskt trupult at fremja, og tá er gott, um breið semja er í tinginum, sigur hann.

## Stór mál

Framtíðar eftirlønarskipan hoyrir eisini inn undir málsøkið hjá landsstýrismanninum í almannamálum.

– Hetta er kanska tað týdningarmesta málið hjá hesi samgonguni at røkka og skal helst fremjast rímiliga tíðliga í valskeiðnum. Hvønn leist vit velja, er ikki til at siga enn, men í samstarvi við landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum og landsstýrismannin í fíggjarmálum fara vit at finna eina loysn, har arbeiðsmarknaðurin og landið bera eina ábyrgd. Samgongan og helst eisini andstøðan skulu góðtaka framtíðar leistin, sigur Páll á Reynatúgvu.

Eitt mál í samgonguskjalinum verður at gera almannaverkið einfaldari og betri. Fólk, ið gerast heft at almannaverkinum, skulu í størst møguligan mun stuðlast at koma úr aftur skipanini.

– Langsiktaða ætlanin er gera nýggja sosiallóggávu frá grundini, men tað verður ikki gjørt eftir einum degi, sigur Páll á Reynatúgvu.

At stovna døgnrøkt, sum allir flokkar í valstríðnum tóku undir við, verður eitt tað fyrsta, sum farið verður í gongd við.

– Hetta er eitt sera týdningarmikið og skjótt mál at fara undir.

– Eldraøkið skal leggjast út til kommunurnar. Her eru ymsar fyrireikingar neyðugar, og tær verða gjørdar í samstarvi við kommunurnar, landsstýrismannin í kommunumálum og landsstýrismannin í fíggjarmálum. Hvussu nógvir pengar fylgja við, er ov tíðliga at siga enn, men til økið er yvirtikið, verður ein játtan, har kommunur kunnu søkja um stuðul úr til bygging av ellis- og røktarheimum. Kommunurnar skulu sjálvar taka stig til byggingina sambært samgonguskjalinum, sigur Páll á Reynatúgvu.

Tjóðveldisflokkurin hevur áður nevnt, at hóskandi er at brúka umleið 25 mió. krónur um árið til bygging av ellis- og røktarheimum.

– Vit vóna, at talið verður so høgt, men eg tori ikki at læsa meg fastan í eina ávísa upphædd. Heldur vil eg brúka orkuna uppá at fáa økið at virka, at fáa so nógv akutt pláss sum til ber og fyrireika yvirtøkuna. Mest sum allir flokkar gjørdu mest vart við tørvin á fleiri ellis- og røktarheimum undan valinum, so eg rokni við, at tað fer at eydnast at stovna fleiri pláss, sigur Páll á Reynatúgvu.

Almannamál eiga at verða løgd nærri brúkaranum og ein háttur at gera tað er at leggja umsitingina út um landið.

– Hetta er ikki einfalt og tað elvir ofta til stríð, tá ið uppgávur verða lagdar út, men eg eri sannførdur um, at ymsir møguleikar eru, sigur Páll á Reynatúgvu.

## Trupult avgerð

Almannaøkið er millum tyngstu og dýrastu uppgávurnar at umsita í landsstýrinum, og Páll á Reynatúgvu viðgongur, at tað var ikki lætt at gera av, um hann skuldi taka við sessinum ella ikki.

– Eg havi nógv atlit at hugsa um, bæði sum borgarstjóri í Sands kommunu, sum løgtingsmaður og sum familjumaður. Eg eigi tvær lítlar døtur, sum eg havi verið nógv heimanifrá í mínum politiska arbeiði, og sum landsstýrismaður verði eg ikki minni heimanifrá. So har var nógv at hugsa um, áðrenn eg tók avgerðina, men at fáa so góðan stuðul frá einum samdum tingbólki vigaði tungt. Men eg veit, at míni bygdafólk eru vónbrotin, at eg fari frá tí positiva arbeiðinum, sum er farið í gongd í Sands kommunu.

At ferðast úr heimbygdini, Sandi, hvønn morgun til arbeiðis í Havn, metir Páll á Reynatúgvu ikki verða ein trupulleika, tí samferðslan er góð.

Sum løgtingsmaður hevur Páll á Reynatúgvu gjørt vart við seg í nógvum viðurskiftum, ið eru meiri lokalpolitisk enn landspolitisk. Spurdur um tað verður trupult at fara inn á ein heilt annan politiskan pall, nú hann er settur at tæna øllum Føroya fólki, sigur hann, at tað roknar hann ikki við.

– Politikkur er altíð ein spurningur um at royna at vaksa í tí lendi, sum er møguligt. Ein politikari, sum er valdur í Suðurstreymoy, hevur einki beinleiðis gagn av bert at hála til Suðurstreymoy. Tá eru tað ofta tær størru linjurnar, sum gera seg galdandi. Hetta sama er galdandi fyri ein landsstýrismann uttan mun til, hvar hann er valdur. Hann hevur ábyrgdina av sínum málsøki galdandi fyri alt landið, og tað fari eg at gera so samvitskufult sum eg nú einaferð kann, sigur Páll á Reynatúgvu, sum leggur afturat, at Sandoyggin ikki verður gloymd av teirri grund.


Vikuskifti í Danmark

Prísur fyri hvønn
Føroyar-Keypmannahavn aftur og fram
1.815,-
Føroyar-Billund aftur og fram
1.853,-
(Ferðaavgjøld eru íroknað prísin)

Tað eru serligar reglur galdandi fyri hesar prísir. Tvey fólk skulu ferðast saman og ferðaseðlarnir skulu keypast 7 dagar áðrenn fráferð. Ferðaseðlarnir kunnu keypast til 9. juni 2002, og seinasti heimferðardagur er 17. juni 2002. Talið á hesum ferðaseðlum er avmarkað.

Set teg í samband við eina ferðaskrivstovu ella far inn á **www.maersk-air.dk**

MAERSK AIR
It's got to be perfect

Shetland Cruise 2002 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team85

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag


Gisting á hotelli
úr einans ... 1.149,- fyri hvønn (í lágárstíð)


Gisting á vallaraheimi
úr einans ... 746,- fyri hvønn (í lágárstíð)


Privat gisting
úr einans ... 878,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo